# Skúlamekling - ein gongd leið

**Turið Debes Hentze, løgfrøðingur og meklari, heldur tað kundi verið eitt hugskot við skúlamekling í royndini at steðga happing. Í Noreg og Svøríki hava tey sera góðar royndir við hesum háttinum, har offur og happari verða konfronterað við einum triðja nemingi sum meklara**



*Turið Debes Hentze, løgfrøðingur og meklari, heldur at skúlamekling kundi verið ein gongd leið at steðga happing*

HAPPING
*Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

Skúlamekling er ein sera nógv brúktur arbeiðsháttur á skúlum í til dømis Noreg og Svøríki.

Turið Debes Hentze, løgfrøðingur og meklari, hevur fylgt við í hesum arbeiðinum og heldur tað kundi verið vert at umhugsa hendan møguleikan í royndunum at forða og steðga happing á føroyskum skúlum.

### Geva og taka ímóti umbering

Turið greiðir frá, at eins og við øðrum trætum er orsøkin til, at happing ofta fær loyvi til at standa við og vesna, ofta, at hvørgin av pørtunum veit, hvussu hin kennir tað. Hetta kemst av, at hvørki happari ella offur nakrantíð hava hoyrt hina síðuna av søguni. Endamálið við skúlamekling er at lata báðar partar fáa høvi at djúpa seg í støðuni hjá hinum partinum. Aftaná fær ein neutralur meklari so høvi at spyrja nærri inn til, hvat tað var, sum gjørdi, at happingin fekk loyvi at halda fram og fekk so álvarsliga avleiðingar.

Tankin er, at tann sum happar, skal konfronterast við tann happaða og skal kunna biðja um umbering fyri sín atburð. Tann happaði skal hinvegin kunna taka ímóti hesi umbering og kunna vísa happaranum tað álit at trúgva uppá, at umberingin er meint í álvara.

Á skúlum, ið nýta hendan arbeiðsháttin, fáa ávísir nemingar møguleika at læra seg at mekla ímillum happarar og offur. Tá báðir partar hava greitt frá síni støðu, kemur meklarin upp í leikin, millum annað við spurningum um, hvussu ein kundi hugsa sær at støðan skal broytast.

### Fastlæstar trætur

- Í grundini ynskir ongin, sum er partur av happingini, at støðan skal halda fram. Ofta kann orsøkin verða ein gomul træta, sum hevur fingið loyvi at læsa seg fullkomiliga fasta, tí ongin veruliga hevur sett orð á hana. Tí endar skúlamekling við einum felags 'brainstorm' har offur, happari og meklari koma við sínum hugskotum um, hvussu man skal bera seg at framyvir.

Turið Debes Hentze hevur sjálv nógvar royndir sum meklari í sínum starvi sum løgfrøðingur. Hon greiðir í hesum sambandi frá, at nógv mál ongantíð áttu at verið endaði í rættinum, júst tí tey væl kundi verðið loyst við mekling, áðrenn tað kom so langt. Við øðrum trætum eins og við happing, snýr mekling seg ikki minst um, at partarnir læra seg at síggja hvønn annan sum menniskju, so teir kunnu byrja at tosa saman og fáa reinsa luftina, so viðurskiftini kunnu fáast í rættlag.

# Móttøka fyri 275.000 krónur

**Tað er lagt upp til eina rimmar móttøku, tá ið nýggi Smyril kemur leygardagin**



*Tá ið nýggi Smyril kemurtil Suðuroyar leygardagin, fer hann at fáa eina móttøku, sum fólk fara at minnast*

SMYRIL
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tað fer ikki stillisliga afturvið borðinum, tá ið nýggi Smyril kemur leygardagin. Ein fyrireikingarbólkur arbeiðir nú við at leggja eina móttøku til rættis. Tilsamans fer hendan móttøkan at kosta 275.000 krónur.

Tað eru nógvir ymsir partar, sum gera hesa móttøkuna møguliga. Størsti einstaki stuðul er Strandferðslan sjálv, sum letur fýrverk fyri 50.000 krónur. Annars lata teir tríggir peningastovnarnir, sum eru í Suðuroy, Føroya Banki, Føroya Sparikassi og Suðuroyar Sparikassi, 25.000 krónur í part.

Men kommunurnar í oynni taka eisini sín part, tí tær lata 30 krónur fyri hvørt fólk í kommununi, ella tilsamans 150.000 krónur.

Afturat tí eru so eisini aðrir stuðlar.

Smyril kemur í Tvøroyri klokkan eitt, saman við Smyrli, sum nú gevst at sigla. Tá verður skrúðgongan av Drelnesi út í nýggju samfeðrsluhavnina og har verður horntónleikur, røður og annað.

Aftaná verður farið í høllina í Trongisvági, at undirhald, tónleikur og annað, verður og har fólk fáa ókeypis pylsur og sodavatn. Um kvøldið verður almennur dansur og tað er alt ókeypis.

Tilsamans vænta fyrireikararnir eini 3000 fólk til tiltakið.

**Hi-Fi**

damor

**LG DVD/Divx avspælari**



Spælir: DVD/CD/Divx/MP3
Ljóðgóðska: Dolby Digital, DTS
Scart og component út
Progressive Scan gevur sera góða myndagóðsku
798,-

**LG DVD Upptakari**



tilboð
Kann takað upp til 6 tímar á ein DVD
Redigerings møguleikar
Spælir DVD, CD og MP3
1.998,-

**Lenco Minianlegg MC131**



CD, MP3, Kassettuband og Radio
USB Slot
1.198,-

**Thomson 28" sjónvarp**



2.998,-
28" sjónvarp við scart stikk, Avinngangi framman og fjarstýring

Á HJALLA · 188 HOYVÍK
TEL 315415 · FAX 319001
damor